Endursenda pallbor›s-fund

SINNISBATI

Almenni pallbor›sfundurin, sum Sinnisbati skipa›i fyri næstseinasta vikuskifti, ver›ur nú endursendur á Rás 2, sum sendi beinlei›is frá fundinum 2. desember.

Fundurin var um vi›urskiftini hjá teimum sálarliga sjúku.

Vi› pallbor›i› á fundinum sótu

Helena Dam á Neystabø, landsst‡riskvinna, Jakup Foldbo, lei›ari á Serforsorgini, Ey›un Jonesen, sálarfrø›ingur á Landssjúkrahúsinum, Magnus Isaksen, sosialrá›-gevi á Landssjúkra-húsinum, Sofus Joen-sen, yvirlækni á psyk. deild., Marin Samuelsen, sjúkrasystir á psyk. deild., Dánjal P. Højgaard, kommulækni í havn, Svenning av Lofti, forma›ur í Sinnisbata og Ásla Svensson, nevndarlimur í Sinnisbata.

Bogi Godtfred, sjónvarpsma›ur, var or›st‡rari. Fyrsti partur var› endursendur í gjáramorgunin, annar partur ver›ur endursendur í dag kl 9 og sí›sta parutr í morgin kl 9 á Rás 2.

Jólakonsert í Fuglafjar›ar Kirkju í kvøld

JÓLAKONSERT
Fuglafjar›ar Hornorkestur

Nú ta› stundar til jóla er eykaspæl á skránni hjá Fuglafjar›ar Hornorkestri. Á›renn vit komu inn í jólamána›an, spældi orkestri› fyri Almu Rustin kl. 7 mánamorgun 27. november, tá hon fylti 100 ár.

– Vit spæla gjarna fyri gullbrú›arpørum og til onnur serlig tiltøk, tá heitt ver›ur á okkum, sigur hornorkestri› í Fuglafir›i í tí›indaskrivi.

– 5. desember vór›u jólatrøini í kommununi tendra›. Fyrst var› spælt í Fuglafir›i, sí›ani á Kambsdali – og at enda á Hellunum. Uni Næs, okkara n‡ggi prestur, flutti fram rø›una í ár. Á Hellunum hevur veri› si›ur, at allar hur›ar hava sta›i› opnar fyri okkum, tá jólatræi› var› tendra›. Har hava vit mangan siti› hugnaligt og fingi› drekkamunn vi› nógvum gó›um afturvi›, á›renn lei›in aftur gekk til Fuglafjar›ar. Tey seinnu árini hava vit veri› saman vi› bygdafólkinum í bønarhúsinum til ein drekkamunn aftaná.

Í fyrrakvøldi› var tann árliga jólakonsertin hjá musikkskúlanum í Fuglafir›i, har vit eisini vóru vi› í ár, sum vit plaga. Har høvdu allir næmingarnir í musikkskúlanum høvi at royna síni kynstur á tí stø›i, tey nú eru á. Vit fingu loyvi at innlei›a konsertina vi› "Christmas Presence" og "Snowman".

12. desember kl. 19 hava vit jólakonsert í Fuglafjar›ar Kirkju vi› fjøltátta›um jólatónleiki. Vi› á konsertini ver›a eisini tríggir her á sta›num vælkendir troubadurar, sum fara at syngja kingoløg fyri okkum. Teir eru Niels Midjord, Hans Jacob Hansen og Petur Jacob Eliasen.

Á›renn orkestri› fær jólafrí, spæla vit sum vant í Fuglafjar›ar kirkju jólaaftan – tíma á›renn gudstænastan byrjar — me›an fólk koma í gó›ari tí› at seta seg.

Vit vilja fegin ynskja øllum eini gle›ilig jól — og takka øllum, sum hava stu›la› okkum í farna ári, sigur Fuglafjar›ar Hornorkestur.

Ókeypis at stovna

Royn allar møguleikarnar!

- Boðtóni
- Parkering
- Trípartasamrøða
- "Trýst 5"
- Veking
- Víðaristilling
- Vís nummar
- Fastur móttakari
- Stutt nummarval
- Sperr við loynitali
- Órógva ikki

Til 1. mars 2001 eru tænasturnar til fastnetið ókeypis at stovna, og mánaðargjaldið er kr. 15,- fyri hvørja tænastu. Les meira í faldaranum, ið verður borin í hvørt hús...

FØROYATELE
tel 80 80 80

petur & petur • 320870

B‡rá›i› søplar tvær milliónir burtur

Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar Kommunu visti einki um, at byggi- og b‡arskipanarnevndin hev›i eitt alternativt tilbo› til venjingarhøllina í Hoyvík, sum var heilar tvær milliónir bíligari. Hetta sigur, at Ronald Poulsen, limur í fíggjarnevndini

ALMENN LISITATIÓN
Stefan í Skorini

Í dag kunnu hoyvíkingar fegnast óført, tí fyrsti spakin ver›ur settur í jør›ina, og arbei›i› at gera n‡ggja venjingarhøll í Hoyvík kann nú byrja av álvara.

Ta› er tó løgi›, at Tórshavnar b‡rá› í tveimum førum ikki velur at taka av lægsta tilbo›num, sum KJ Smí› átti. Úrsliti› er, at skattgjaldarin má sví›a, tí arbei›i› gerst óney›uga kostna›armiki›.

Hetta er falli› KJ Smí› fyri brósti›, og nú ver›ur b‡rá›i› stevnt fyri rættin eftir endurgjaldi.

Hóast KJ Smí› hev›i lægsta tilbo›i› uppá jør›, kloakk og betong arbei›i› var› hetta arbei›i› lati› Byggitek, sum hev›i eitt tilbo›, i› var 200.000 krónur d‡rari.

Harafturat hev›i KJ Smí› eitt samla› tilbo› uppá at byggja alla høllina fyri 9,8 milliónir, men b‡rá›i› velur heldur at gera hana fyri 11,78 milliónir. Skattgjaldarin má lata 2 milliónir meira enn ney›ugt fyri eina venjingarhøll í Hoyvík.

B‡rá›i› hevur bi›i› um tilbo› til seks ymisk arbei›i og eitt samla› tilbo› fyri alla høllina.

KJ Smí› hevur eitt samla› tilbo› uppá 9.806.491,45 krónur. Vi› at taka tilbo›i› hjá Byggitek uppá jør›, kloakk og betong framum kemur prísurin uppá 10.075.563,67 krónur. Harafturat skal Veri-Con hava 17% av hesum prísinum. Sostatt ver›ur samla›i prísurin 11.788.409,49 krónur.

Munurin er slakar tvær milliónir krónur.

Fíggjarnevndin ikki kunna›

Eftir tilmæli frá byggi- og b‡arskipanarnevndini, har He›in Mortensen er forma›ur, hevur fíggjarnevnd b‡rá›sins samtykt uppskoti› frá teimum um at taka av tilbo›num, sum er d‡rari.

– Vit hava einki fingi› at vita um naka› alternativt tilbo›, sum er lægri enn ta›, vi› hava gó›tiki›. Vit áttu at veri› kunna›ir um hetta, á›renn naka› var› samtykt, sigur Ronald Poulsen, limur í fíggjarnevndini.

Grundgevingin hjá b‡rá›num fyri ikki at lata KJ Smí› arbei›i› er, at teir ikki eru limir í Føroya Handverksmeistarafelag, men hetta er tó ikki so.

Ta› stendur tó ongasta›ni í útbjó›ingartilfarinum, at tilbo›sgevarin skal vera limur í Føroya Handverksmeistarafelag.

Tveir mans standa fyri KJ Smí›. Teir eru Kristen Johansen og Jóni Durhuus. Hesin seinni eru limur í meistarafelagnum, me›an Kristen ikki er.

– Eg dugi ikki at síggja, hví bá›ir skulu vera limir í meistarafelagnum. Um vit bá›ir vóru limir, kundu vit ikki arbeitt á sama sta›, sigur Kristen Johansen.

Grundgevingin hjá b‡rá›num er sostatt ikki røtt, tá teir siga, at KJ Smí› ikki er limur í meistarafelagnum.

Kristen Johansen fekk heldur ikki at vita, at ney›ugt var› at vera limur í meistarafelagnum fyri at fáa arbei›i›. Var› hann kunna›ur um ta›, hev›i hann sjálvsagt tekna› seg sum lim beinanvegin.

Fyritøkan, sum skuldi gera vatn, hita og ventilatión, var ikki limur, men fekk bo› um at fáa hesi vi›urskifti í rættlag.

– B‡rá›i› hevur ongantí› vent sær til mín fyri at kanna vi›urskiftini í fyritøkuni hjá okkum. Teir hava bara vent sær til Føroya Handverksmeistarfelag og Skráseting Føroya fyri at kanna máli›, sigur Kristen.

KJ Smí› hevur sostatt ongantí› havt møguleika at grei›a frá sínum vi›urskiftum. Hetta hevur b‡rá›i› skyldu til at syrgja fyri.

B‡rá›i› stevnt

KJ Smí› hevur nú vent sær til sakførara fyri at fáa grei›i á vi›urskiftunum.

Í telefaksi til Leiv Hansen og He›in Mortensen, sum er sent teimum 24. november, sta›festir sakførarin hjá KJ Smí›, at hansara klientur hev›i lægsta tilbo›i›, sum er 4.732.447 krónur. Tilbo›i› hjá Byggitek er 4.948.202 krónur.

Kristen Johansen frá KJ Smí› er sera misnøgdur vi› mannagongdina í málinum í sambandi vi› lisitatiónina av venjingarhøllini í Hoyvík. Teir hava lægsta tilbo›i› í tveimum førum, men fáa tó ikki arbei›i›. Skattgjaldarin má sví›a
Mynd: Jens Kr. Vang

Í faksinum stendur, at »talan hevur veri› um almenna lisitatión, og b‡rá›i› hevur tí skyldu at taka av lægsta tilbo›num«.

Í faksinum ver›ur eisini ávara› um, at tekur b‡rá›i› av næstlægsta tilbo›num, so ver›ur ta› stevnt. B‡rá›i› var› sostatt kunna› um hetta, á›renn nakar sáttmáli var› gjørdur.

Sakførarin skrivar eisini, at hann roknar vi›, »at talan er um eitt mistak, og at hann væntar at frætta aftur beinanvegin«.

1. desember fær KJ Smí› stutt bræv frá Veri-Con, sum er rá›gevandi verkfrø›ingurin í projektinum. Í brævinum ver›ur bo›a› frá, at arbei›i› er lati› ø›rum arbei›staka.

Sakførarin metir, at »undir slíkum umstø›um er eftir míni metan rættuliga greitt, at b‡rá›i› hevur broti› reglurnar bæ›i í lisitatiónslógini og fyrisitingarlógini«.

Vóru klárir

Kristen Johansen vísir á, at teir vóru førir fyri at gera arbei›i› uppá alla høllina til lítar.

– Vit hava bílagt pláss ni›ri í Danmark at gera stálkonstruktiónirnar og betongelementini, og hava gjørt ta› ney›uga fyrireikingararbei›i›, sigur Kristen, sum finst hvassliga at b‡rá›num fyri handfaringina av hesum málinum.

– Einasta orsøkin til, at vit ikki hava fingi› arbei›i›, er, at Byggitek og Veri-Con skulu hava sín bita at køkuni. Skattgjaldarin má gjalda í seinasta enda.

Kristen Johansen leggur eisini formannin í Føroya Handverksmeistarafelag, Tummas Sørensen, undir at hava veri› handan leiktjaldi› og fingi› avtalur uppá pláss, og hann hevur eftir øllum at døma tosa vi› Veri-Con og fingi› teir at vraka KJ Smí›. Tummas Sørensen er eisini eigari av Byggitek, sum fær arbei›i› ísta›infyri KJ Smí›.

Sosialurin hevur roynt at fingi› fatur á fleiri persónum, sum hava vi› hetta máli› at gera, men ta› hevur ikki eydnast okkum at fingi› nakra vi›merking frá teimum.

Bilpakkar Føroyar - Danmark ella hinvegin

	4-koyggju kamar v. wc/bað	2-koyggju kamar v. wc/bað	Luksus kamar
Bilur + 4 fólk	3.640,-	4.620,-	6.940,-
Bilur + 3 fólk	2.920,-	3.660,-	
Bilur + 2 fólk	2.210,-	2.700,-	3.860,-

Fyrsta fráferð er fríggjadagin 13. oktober.

Frítíðarbúðir/Summarhús:
Danland í 1 viku úr 4.995,-
2 vaksin & 2 børn í bili
Dansk Folkeferie í 1 viku úr 5.995,-

Hotel:
Hotel Excelsior í 1 viku - Keypmannahavn úr 3.795,-
fyri hvønn, við 2 ferðandi í bilinum
Park Hotel í 1 viku - Ålborg úr 3.350,-

team 85 · 31 65 11

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
E-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.com